# Sosialurin

Nr. 86 Mikudagur • 7. mai 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo






15 ókeypis minuttir

hvønn mánað, við fartelefonhaldi

kall




Lagnuval í seks kommunum Síða 3



Føroyingar í Parkini:

HEY JUDE Síða 4




Reklamuvirki stevnt flokki:

Vallýsing endaði í rættinum Síða 7



# Finnur kendi seg hóttan av Pálli

**Áðrenn tingið fór til hús fríggjadagin, sendi Finnur Helmsdal, tingmaður Tjóðveldisfloksins, løgmanni bræv, har hann ger vart við, at Páll á Reynatúgvu hevur hunddálkað seg og hótt sesg við privata starvi sínum á Barnaheiminum**

Síða 5 & 27

Í brævinum til løgmann sigur Finnur Helmsdal m. a.: at aftaná, at Páll á Reynatúgvu hevði skírt seg bæði eitt og annað, segði hann við seg í tingsalinum fríggjadagin 2. mai:

»Tú ert kanska leiðari á Barnaheiminum, men har hevur tú einki at siga. Har havi eg eisini alla maktina«.

– Tá eg síðani havi hoyrt frá tíðindastjóranum í Svf persónliga, at hann hevði spurt landsstýrismannin, hvar hann nú ætlaði at finna peningin, hevði landsstýrismaðurin sagt, at hesin kanska var at finna á Barnaheiminum, sigur Finnur Helmsdal.

Tingmaðurin sigur, at brævið ikki er ein klaga.

– Men tá hevndarhugur landsstýrismansins er væl kendur millum manna, haldi eg, at landsins ovasti umsitingarligi leiðari eigur at vita um hetta, áðrenn eg fari at kenna sviðan, sigur Finnur Helmsdal í brævinum til løgmannn, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.


BRÚGVIN

v/Carl August Ange

- Alkoholtrupulleikar
- Rúsevnistrupulleikar
- Viðgerð fyri avvarðandi
- Eftirviðgerð
- Rúsevnapolitikkur á arbeiðsplássinum
- Fyrilestrar og skeið

Ambulant viðgerð

www.vestmannabjorgini.com

Tel. 42 43 05



BILALEIGA Runavík



RENT A CAR

BBR Service

Tel. 44 91 11

219011-219111

Kaj Andreasen & Co

Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

Er ætlan at keypa ella leiga:

- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klemmur, konus, avstandarar v.m.
- Facadustillads
- Trygdargirðing
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar

HÜNNEBECK

Leverandørurin til føroyskt byggivirki í 28 ár